# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Barrack Obama hevur eini ótrúlig evni til at fáa samband við fólk, og so er hann skilagóður afturat. Hann vinnur*

*Kevin Lampe, ráðgevi*

## Russar tóku amerikanskar hernaðarbilar



*USA krevur, at russiski herurin skal lata frá sær hernaðarbilar, sum teir russisku hermenninir hava tikið undir átakinum í Georgia. Talan er um nýggjar hernaðarbilar, sum georgiski herurin hevði fingið úr USA, og sum russar nú hava lagt hald á og tikið við sær. USA sigur, at russar skulu lata bilarnar sum tann á myndini frá sær.*

## Abkhasia vil hava sjálvstýri

**Georgiski landsluturin Abkhasia bað í dag russiska tjóðartingið viðurkenna sítt sjálvstýri. Russar fara at siga ja**

Russland tekur undir við, at georgisku landslutirnir Abkhasia og Suðurossetia sleppa at taka seg burtur úr Georgia, men Moskva hevur kortini ikki viljað viðurkent økini sum sjálvstøðug lond.

Nú hevur abkhasiska tingið so sent tjóðartingin-um í Moskva eina formliga áheitan um viðurkenning, og sambært tíðindastovuni Interfax verður svarið úr Russlandi játtandi. Í hvussu er endurgevur tíðindastovan formannin í russiska tjóðartinginum fyri at siga, at meirilutin er til reiðar at ganga abkhasisku áheitanini á møti.

Vesturlendskir eygleiðarar siga, at tað er ikki vist, at formaðurin umboðar meirilutan, ella um orð hansara bara eru eitt íkast til stríðið millum Russland og Vesturheimin um Georgia.

Bæði Abkhasia og Suðurossetia hava kravt altjóða viðurkenning sum sjálvstøðug lond og hava víst á, at altjóða samfelagið hevur viðurkent fyrrverandi serbiska landslutin Kosovo sum sjálvstøðugt ríki. Tey krevja somu rættindi, men higartil hava USA, ES og NATO hildið uppá, at Abkhasia og Suðurossetia eru partar av Georgia.

Abkhasia og Suðurossetia slitu seg leys bav Georgia í nítiárunum, men enn hevur einki land viðurkent tey sum sjálvstøðug.

## Iran skal byggja seks kjarnorkuverk

**Iranska stýrið letur seg ikki ávirka av trýsti uttaneftir, men ætlar at byggja seks kjarnorkuverk**

Iranska stjórnin hevur biðið seks fyritøkur finna støð til tey seks kjarnorkuverkini, og sambært áheitanini skulu feløgini finna tey røttu plássini innan eitt ár. Sambært myndugleikunum vóru fyritøkur í Kanada, Russlandi og Sveis við í útbjóðingini, men avgjørt varð at lata iranskar fyritøkur fáa arbeiðið.

Iran hevur einki kjarnorkuverk, men eitt er í gerð í Bushehr. Tað verður bygt við russiskari hjálp og skuldi upprunaliga takast í brúk fyri átta árum síðani. Men altjóða mótstøða og tiltøk hava gjørt, at arbeiðið er nógv seinkað. Nú er arbeiðið tikið uppaftur, og iranskir talsmenn hava sagt, at ætlanin er at seta tann fyrsta reaktorin í gongd fyri árslok í ár.

Russland hevur lovað Iran brennievni.



*Iranski forsetin, Mahmoud Ahmadinejad, vil ikki slaka í kjarnorkumálinum*

*Mynd: Polfoto*

**STUTT SAGT**

### Persónligt tilfar til sølu

Í seinastuni hava týskir myndugleikar lagt seg eftir at tryggja persónligar upplýsingar, sum verða viðgjørdir elektroniskt, men kortini vistu fjølmiðlarnir í gjár at siga, at ymsir persónligir upplýsingar um fleiri túsund týskarar vóru til sølu á internetinum. Ein maður, sum arbeiðir hjá einum telefonfelagi, gjørdi vart við trupulleikan við at senda eftirlitinum persónligar upplýsingar um 17.000 týskar einstaklingar, skrivar tíðindastovan DPA.

Hetta er ikki tann fyrsta gølan av hesum slagnum í Týsklandi í ár. Í vár kom fram, at eftirlitið við persónligum upplýsingum er alt ov tilvildarligt. Fleiri halda, at týska lógin er ov lagalig, og at tað kemst av, at løgreglan vil hava atgongd til alskyns upplýsingar í bardaganum ímóti yvirgangi.



*Tað er ov lætt at fáa fatur á persónligum upplýsingum í Týsklandi*

*Mynd: DPA*

### Rakettin fór ikki uppfrá

Sunnudagin boðaðu iransku myndugleikarnir frá, at Iran hevði sent eina rakett út í rúmdina, men nú sigur tíðindastovan Reuters frá amerikonskum keldum, at rakettin fór ongantíð uppfrá. Amerikonsku keldurnar vilja ikki leggja navn til tíðindini, men sambært Reuters siga tær, at rakettin datt niður, beint sum hon skuldi lætta sær á.

Iran liggur í stríði við Vesturheimin um landsins kjarnorkuverkætlan, og í fráboðanini sunnudagin segði iranska stjórnin, at tann væleydnaða rakettroyndinskuldivísaumheiminum, at Iran er ført fyri at senda ein fylgisvein út í ringrás um jørðina. Men hava amerikonsku keldurnar rætt, er einki í hesum.